AKSTOVAN

# SÝNSFÓLK

## Akstovan søkir eftir sýnsfólki at byrja skjótast gjørligt.

### UPPGÁVAN

Uppgávan snýr seg um regluligt sýn av akførum og umsýn av akførum, sum ikki verða góðkend við fyrsta sýn. Starvsøkið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, og høvuðsarbeiðsstaðið verður í Tórshavn. Tað eru 6 sýnsfólk í starvi á deildini.

### FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum, at tú hevur bilmekanikaraútbúgving og hollar royndir á økinum. Dentur verður lagdur á, at tú hevur góð samstarvsevnir og ert fyrikomandi, men kortini kann fremja sýnsarbeiðið á ein myndugan hátt. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur útbúgving sum stórvognsmekanikari, hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

### SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Samferðslumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

### UMSÓKNIR

Umsóknir við avritum av møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Akstovan**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
FO 110 Tórshavn
ella til **akstovan@akstovan.fo**

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **1. juli 2019**. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Búgva Apol, deildarleiðara, á tlf. 35 04 28.

*Akstovan er stovnur undir Samferðslumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfarstøkniligar kanningar og akfarssýn, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfarsskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um landið. Á Akstovuni starvast 23 fólk.*